Árni Skaale
Jørgen Niclasen
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
Jacob Vestergaard
Bárður á Lakjuni
Beinir Johannesen
vegna Fólkaflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.
(Striking av mótrokning av nettoinntøku, ið verður skattað eftir kapitalvinningsskattalógini)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl., sum seinast broytt við § 3 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verður § 3, stk. 2 strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Almennar viðmerkingar
Sambært galdandi lóggávu hava pensjónistar ikki rætt til viðbót til ávísar pensjónistar (eisini nevnd brennistuðul) um so er, at viðkomandi hevur nettoinntøku omanfyri kr. 2.000, ið verður skattað eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini.

Tað merkir, at um pensjónistur hevur skattskylduga inntøku afturat pensjónini, ið er minni enn kr. 60.000 fyri støk og kr. 80.000 fyri gift, og harumframt at virðið av t.d. rentuinntøku ella líknandi er omanfyri kr. 2.000, lýkur viðkomandi ikki treytina fyri at fáa viðbót til ávísar pensjónistar.

Upphæddin, ið pensjónisturin missir rættin til, er kr. 8.160 (upphædd í 2024).

Endamálið við hesum lógaruppskoti er at strika kravið um, at ávísur kapitalvinningur, t.d. rentuinntøka, skal gera, at sonevndi brennistuðulin fellur burtur.

Fleiri pensjónistar og fyritíðarpensjónistar hava í undanfarnu árum upplivað, at tey hava mist brennistuðulin, tí tey hava haft ein kapitalvinning, sum er størri enn kr. 2.000. Serliga gjørdust teir rættiliga mongu smáeigararnir í BankNordik kløkkir, aftaná at hava móttikið líka yvir kr. 2000 í vinningsbýti í 2022. Talan var um eina niðurkapitalisering, sum mest sannlíkt ikki verður gjørd tíðum.

Tað kennist órættvíst at missa kr. 8.160, tí tú hevur tjent kr. 2.000 í kapitalvinningi. Serliga kennist tað møtimikið, tá rokningin kemur aftaná, t.v.s. at brennistuðulin skal endurrindast aftaná, at pensjónisturin hevur móttikið tær 2.000 kr.

Tey, sum hava verið rakt av hesi ásetingini seinastu árini, eru í fleiri førum fólk, sum hava átt nøkur fá partabrøv, sum hava givið eitt vinningsbýti, sum er størri enn markið uppá kr. 2.000.

Kapitalinntøka er eisini rentuinntøkur av innistandandi. Nú tá rentan aftur er farin at hækka, er vandi fyri, at fleiri fara at verða rakt av hesi regluni, bara tí tey eiga nakrar krónur á bók.

Ásetingin er galdandi fyri allar fyritíðarpensjónistar, men ikki fyri allar pensjónistar.

Tað eru bara pensjónistar, ið eru fødd áðrenn 1. januar 1953, sum fáa brennistuðul. Hjá teimum pensjónistum, ið er føddir eftir 1. januar 1953, er brennistuðul ikki sjálvstøðug viðbót, men er roknað við í pensjónina. Tað merkir, at tað bara eru pensjónistar, sum eru føddir áðrenn 1. januar 1953, sum verða raktir av óhepnu ásetingini í hesi lóg um serliga mótrokning fyri kapitalvinning. Eru tey fødd eftir 1. januar 1953, er hendan ásetingin ikki galdandi.

Brennistuðul hevur eisini sum treyt eitt annað inntøkumark. Um inntøkan hjá einum støkum pensjónisti fer upp um kr. 60.000 og kr. 80.000 hjá hjúnum, so fellur brennistuðulin burtur. Inntøka í hesum marki er ein samanteljing av lønarinntøku, eftirlønarútgjaldi og kapitalvinningi.

Tað tykist løgið, at ein inntøka, sum er kapitalvinningur, skal revsast harðari, enn ein og hvør onnur inntøka.

Fyriliggjandi uppskot javnsetur allar inntøkur, so brennistuðul einans fellur burtur, um allar inntøkur samanlagt fara upp um markið, sum fyri støk er kr. 60.000 og fyri hjún kr. 80.000.

Hetta merkir, at verður markið á kr. 2.000 strikað, so merkir tað ikki, at pensjónisturin kann hava púra óavmarkað av kapitalinntøku.

Uppskotssetararnir halda, at rættast er at síggja allar inntøkur líka.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Í hagtølum frá Almannaverkinum sæst, at talið á persónum, sum í 2022 fingu brennistuðul eru:

Fólkapensjónistar ógiftir: 2234 persónar
Fólkapensjónistar giftir: 1768 persónar
Fyritíðarpensjónistar ógiftir: 738 persónar
Fyritíðarpensjónistar giftir: 90 persónar
Tilsamans 4830 persónar

Í 2022 vóru tað 541 fólkapensjónistar í gomlu pensjónsskipanini, sum høvdu kapitalinntøkur hægri enn kr. 2.000. Nýggir pensjónistar hava sum kunnugt ikki rætt til brennistuðul. Og í 2022 vóru tað bert 65 fyritíðarpensjónistar, sum høvdu kapitalinntøku hægri enn kr. 2000.

Talið á pensjónistum, sum hava haft hægri vinningsbýti enn kr. 2.000:
2019: 282
2020: 184
2021: 638
2022: 541

Sum tað sæst á tølunum, eru tað serliga nógvir pensjónistar, sum hava hægri kapitalinntøku enn kr. 2000 tey bæði árini, BankNordik hevur latið serliga stórt vinningsbýti. Tað stóra lopið er frá 2020 til 2021 tá 638 – 184 = 454 fleiri persónar høvdu hetta vinningsbýti. Vit síggja tó í talvuni niðanfyri, at útgjaldið bert lækkaði við kr. 348 frá 2020 til 2021.

Útreiðslurnar til viðbót til ávísar pensjónistar eru sum ávíst niðanfyri.
Útreiðslur hava seinastu árini verið (í tús. kr.):
2013: 30.114
2014: 30.745
2015: 30.674
2016: 30.758
2017: 26.059
2018: 31.778
2019: 30.732
2020: 32.257
2021: 31.909
2022: 31.875
2023: 30.170 (ikki endaliga uppgjørt)

Upplýst er, at orsøkin til, at útreiðslurnar í 2017 vóru lægri, er tí, at útgjaldið bleiv broytt frá at verða útgoldið hvønn ársfjórðing til eitt mánaðarligt gjald. Hetta gav eina eingangssparing í 2017 uppá nakrar mió. kr.

At talið er minkandi hevur sannlíkt samband við, at tað nú bert eru pensjónistar, sum eru føddir áðrenn 1. januar 1953, sum fáa brennistuðul.

Ilt er at meta um nágreiniligu fíggjarligu avleiðingarnar. Verður uppskotið samtykt, verður kapitalvinningur framvegis roknaður við í inntøkumarkið á ávikavist kr. 60.000 (støk) og kr. 80.000 (hjún). Men um vit ganga út frá, at millum 5 og 10% av teimum, sum hava meira enn kr. 2.000 í kapitalinntøku, frameftir fara at fáa brennistuðul, er kostnaðurin millum kr. 300.000 og kr. 600.000.

Mett verður ikki, at uppskotið hevur nakrar umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Við broytingini verður viðbót til ávísar pensjónistar ikki ávirkað av, at virðið av nettoinntøku, ið verður skattað eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini, er omanfyri kr. 2.000 árliga.

Kapitalvinningur verður sostatt einans roknaður við í samlaða inntøkumarkið fyri at fáa rætt til viðbót til ávísar pensjónistar.

Til § 2
Uppskotið kemur í gildi 1. januar 2024. Tað merkir, at broytingin fer at hava afturvirkandi virknað. Eftirrokning av viðbót til ávísar pensjónistar fer fram, tá árið er farið afturum. Tað merkir, at eftirrokning fyri árið 2024 fer fram í 2025. Pensjónistar, sum av órøttum ikki hava fingið viðbót til ávísar pensjónistar í 2024, fáa alla upphæddina útgoldna í sambandi við eftirrokningina í 2025.

Á Løgtingi, 13. februar 2024

Árni Skaale	Jørgen Niclasen	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
Jacob Vestergaard	Báður á Lakjuni	Beinir Johannesen